# Størv í Fuglafjarðar skúla

Søkt verður eftir fólki, sum
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við starvsfólk skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

Fyri lærara, sum fer í barnsburðarfarloyvi, verður søkt eftir lærara at byrja skjótast gjørligt.
- 2 tímar í ítrótti í 8. fl. (gentur)
- 12 tímar í enskum í 6., 7. og 8. fl.
- 5 tímar í føroyskum í 8. fl.
- 2 tímar í serundirvísing

Fyri lærara, sum fer frá fyri aldur, verður søkt eftir lærara at byrja 6/12 2008.
- 8 tímar donskum í 8. og 9.fl
- 3 tímar í serundirvísing.

Eisini verður søkt eftir fólki at undirvísa 6 tímar í motorlæru í 8., 9. og 10. fl

**Førleikakrøv:** læraraútbúgving krevst.
Um eingin umsøkjari er, sum lýkur treytirnar, verða onnur sett í størvini.

**Lønar- og setanartreytir**
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu vera Fuglafjarðar skúla, Traðarvegur 2, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. november 2008 kl. 15.

Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til skúlastjóran tlf. 737813.

## Fuglafjarðar skúli

**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður**



# HANDILSHØLI
## til leigu í miðbýnum

Handilshøli í bygninginum yvirav FK í Dr. Jacobsensgøtu til leigu. Hølini eru í veghædd.

**Tlf 314980 ella 283067**

umhvørvisstovan
ENVIRONMENTAL AGENCY

## FRÁBOÐAN UM UMHVØRVISGÓÐKENNING

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Umhvørvisstovan tann 13. november 2008, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 14. mai 2008 og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, nr. 4 og 4a, seinni broytt í grein 5, nr. 1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, hevur góðkent:

**Umlastingarstøð hjá IRF á Gjánoyri**

Góðkenningin liggur alment frammi á Umhvørvisstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Umhvørvisstovuni, Traðagøta 38, FO-165 Argir, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, www.us.fo.

**Umhvørvisstovan**
Boks 2048 · Tlf. 342400
FO-165 Argir · us@us.fo
www.us.fo

Ein tøkk til øll tykkum, ið stuðlaðu Javnarflokkinum á Tvøroyri til kommunuvalið 2008, og ein serstøk tøkk til tykkum, ið stuðlaðu mær persónliga.

Somuleiðis ein tøkk til Marjun Olsen og Sverra Midjord fyri gott samstarv í undanfarna valskeiði.

**Kristin Michelsen**



Sosialurin
www.sosialurin.fo

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

SKEIÐ Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA
– várið 2009

## Próvskeið í føroyskum

Á skeiðnum lærir tú at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi, og tú fært betri fatan av føroyska málinum.

| | |
|---|---|
| **Lærari:** | Randi Kúrberg |
| **Skeiðsstað:** | Fróðskaparsetur Føroya, Jónas Broncks gøtu 25, 4. hædd, 100 Tórshavn |
| **Tíðarskeið:** | 5. jan.-26. mars 2009 (12 vikur). |
| Próvtøka: | 28. og 30. mars 2009 |
| Tilmelding: | Tilmeldingarskjal á heimasíðuni: www.setur.fo |
| Tilmeldingarfreist: | 18. desember 2008 |
| Tilmeldingargjald: | kr. 1.000,00 |
| Próvtøkugjald: | kr. 500,00 |

Undirvísing er mánadagar og hósdagar, báðar dagar kl. 16.15 - 18.30, umframt leygardagin 7. mars kl. 9.00-14.30.

Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt sum móðurmál og hava gingið í miðnámsskúla ella samsvarandi.

Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, so hvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

Nágreiniligari upplýsingar um skeiðið eru at fáa á Setursskrivstovuni. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

Sp/f. **GRAVSTEINAR**




*Opið: mánadag - fríggjadag 9[00]-17[00]*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo